# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit skulu bjarga Fraklandi, og teir sosialu ágóðarnir skulu latast fransmonnum*

*(Jean-Marie Le Pen)*

# Amerikanskir generalar hótta við at siga upp



*Amerikanski flogberin „USS John C. Stennis“ kom í Persaflógvan í síðstu viku*

**USA herðir trýstið á Iran við at senda herskip og flogfør í Persaflógvan. Samstundis siga amerikanskir generalar, at teir siga upp í teirri løtu, forsetin gevur boð um álop á Iran**

Í London ávarar Tony Blair, forsætisráðharri, amerikanararnar ímóti at leypa á Iran. Í Washingon svarar Dick Cheney, varaforseti, at allir møguleikar standa opnir, eisini kríggj, og fleiri halda, at George W. Bush, forseti, ætlar sær at enda sítt forsetaskeið við at leypa á Iran.

Nógvir amerikanskir politikarar hava gjørt greitt, at teir eru ímóti einum álopi á Iran, og í gjár frættist, at fimm amerikanskir generalar og admiralar eru til reiðar at leggja frá sær, um forsetin ger av at seta álopið í verk.

Ein bretsk fregnartænastukelda sigur við blaðið Sunday Times, at fýra ella fimm her- og herflotaovastar hava gjørt av at siga upp í teirri løtu, Bush ger av at leypa á Iran. Sambæret blaðnum hevði eitt stig av hesum slagnum verið púra óhoyrt í USA. Fregnartænastukeldan vil vera við, at mótstøðan ímóti einum álopi á Iran er veksandi í verjumálaráðnum Pentagon, og at fleiri herovastar halda eitt tílíkt álop vera nógv truplari, enn tað kanska kann tykjast.

Í dag er fundur í London um iransku kjarnorkuætlaninar, har umboð fyri Bretland, USA, Russland, Týskland, Frakland og Kina skulu urøða støðuna.

### CIA í Iran

Amerikanararnir hava longu tikið síni egnu stig. Í síðstu viku kom flogberin „USS John C. Stennis“ í Persaflógvan, so nú hevur USA tveir flogberar og fleiri minni herskip í flógvanum. Harafturat hevur amerikanska flogvápnið flutt seks stór bumbuflogfør, sum kunnu hava kjarnorkubumbur, av einari flogstøð í Bretlandi til kyrrahavsoynna Diego Garcia. Sambært blaðnum Sunday Telegraph er hetta gjørt, fyri at USA skal sleppa frá at biðja Bretland um loyvi til at brúka flogførini til álop.

Sunday Telegraph vil eisini vera við, at amerikanska fregnartænastan CIA hevur fíggjað ymsar andstøðubólkar í sjálvum Iran og eggjað teimum til at arbeiða ímóti politikkinum hjá Mahmoud Ahmadinejad, forseta. Eitt nú skal CIA hava latið kurdunum har vesturi í Iran fíggjaligan stuðul.

John Pike, sum stendur á odda fyri granskarabólkinum Global Security í Washington, vísir í samrøðu við Sunday Telegraph á, at í seinastuni hava fleiri álop og bumbuspreingingar verið í Iran, og hann ivast ikki í, at tað eru CIA-stuðlaðir bólkar, sum hava skipað fyri álopunum.

Hann ávarar samstundis USA ímóti at leypa framav, tí samstarv við teir iransku bólkarnar kann enda sum samstarvið millum CIA og Taleban í Afghanistan, sigur hann.

-Teir taka ímóti pengunum, men so skjótt teir fáa vald, venda teir sær ímóti USA, sigur John Pike.

# Al-Qaeda hevur ment seg

**Hóast vøkur lyfti frá myndugleikunum í Pakistan hevur al-Qaeda havt umstøður til at menna seg har.**

Rættiliga óvæntað kom amerikanski varaforsetin, Dick Cheeny, til Pakistan í morgun, og sambært The New York Times var hann ikki ørindaleysur.

Blaðið veit at siga, at sambært frágreiðingum hjá CIA hevur yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda ment sínar støðir í Pakistan í seinastuni, hóast pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, hevur lovað at handtaka allar al-Qaeda-limir í landinum. The New York Times skrivar, at gongdin hevur ørkymlað amerikonsku herleiðsluni, sum ber ótta fyri, at pakistanska deildin hjá al-Qaeda fer at hjálpa Taleban, sum hevur boðað frá einum stórum átaki í Afghanistan í vár.

Ørindini hjá Dick Cheeny eru tí at geva Musharaf greið boð um, at hann skal halda orð, skrivar The New York Times.

## STUTT SAGT

### Javnt í Fraklandi

Í Fraklandi vísir ein meiningakanning, at var fyrra umfar av forsetavalinum nú, hevði tað staðið á jøvnum millum sosialistiska valevnið Segolene Royal og Nicolas Sarkozy, innanríkisráðharra. Tey høvdu fingið 28 prosent í part. Var talan hinvegin um seinna umfar, og valið framvegis stóð millum tey bæði, hevði Sarkozy vunnið 50,5 prosentum ímóti 49,5 til Segolene Royal. Annars hava kanningar í seinastuni víst, at Nicolas Sarkozy var væl framman fyri Segolene Royal, men tann nýggja kanningin vísir, at nú er mundurin tódnaður burtur í einki.

### Fleiri fátæk

Tey ríku í USA gerast altsamt ríkari, og tey fátæku gerast altsamt fátækari, og munurin millum rík og fátæk hevur ongantíð verið so stórur sum nú. Harafturat er talið á blóðfátækum amerikanarum tað størsta síðani síðst í sjeytiárunum. Tað er úrslitið av einari kanning, sum blaðfyritøkan McClatchy hevur gjørt, og sum varð almannakunngjørd í gjár. Kanningin vísir, at minst 16 mió. amerikanarar liva í størsta fátækradømi. Fyri ein einstakling merkir tað, at hann hevur minni enn 28.000 krónur at liva fyri um árið, og fyri eini hjún við tveimum børnum merkir tað, at tey hava minni enn 56.000 krónur at liva fyri í eitt ár. Kanningin vísir, at talið á teimum fátækastu er vaksið 25 prosent síðani 2000.

### Ein drúgv ferð

Sunnumorgunin fór rúmdarfarið Rosetta fram við gongustjørnuni Mars. Rosetta, sum er á veg til kometina Tjurjomov-Gerasimenko, varð skotin út í mars í 2004, og ætlanin er, at hon skal røkka málinum eina ferð í 2014. Tá hevur hon ferðast 6.000 milliónir kilometrar. Umborð á rúmdarferinum eru tól, sum ætlandi skulu setast niður á Tjurjomov-Gerasimenko, og sum skulu geva vísindafólkum ymsar upplýsingar kometina. Hesi kanningartólini eru gjørd í Svøríki.